# …JA MEIRA …ROYAR



*Einki arbeiðsloysi er í Hetlandi og føroyingar eru vælkomnir at vera við til at menna Hetland sigur formaður í hetlendska oyggjaráðnum*

Stórir goymslumøguleikar eru í Sullom Voe, nú virksemi her er minkað seinastu árini, so her er eisini pláss fyri føroyskari olju og gassi í framtíðini.

**Milliardir frá oljuni**

Hvussu sær Sandy Cluness oljuframtíðina vestan fyri Hetland og heilt vestur móti føroyska markinum!

– Tað var tann tíð, at tað vórðu boraðir tíggjutals brunnar uttan at nakað veruligt fund varð gjørt. Vit máttu veruliga brynja okkum við toli, men so kom brádliga hol á, at tað vísti seg, at her var bæði olja og gass. Fyrsta oljan kom í land í Hetlandi í 1978 og hevur hon lagt nógvir milliardir krónur eftir seg í oyggjunum, serstakliga eftir at Sullom Voe oljuterminalurin varð bygdur.

Tað eru gjørd nógv nýggj fund við bæði olju og gassi, og fleiri teirra eru ikki so langt frá føroyska markinum. Total er við at byggja út síni gassfelt, og oljufeløg sum Chevron, Amerada Hess og BP eru í gongd við stórar útbyggingar eisini, so samanumtikið sær framtíðin bjørt út vestan fyri Hetland.

– Hava tit brúk fyri føroyskari arbeiðsmegi?

– Tað veldst um, hvat verður at gera her í framtíðini. Tað átti at verið arbeiði í sambandi við oljumenning og arbeiðinum við varandi orku. Hinvegin hava vit ikki so nógv at siga, tá stór oljufeløg sum Total byggja út, tí tey útvega arbeiðsmegina sjálvi. Ein kann so hyggja at teirra heimasíðu og finna arbeiði har.

Sandy Cluness heldur sjálvur, at stórar goymslur av ikki minst gassi liggja fjaldar í undirgrundini vestan fyri Hetlandi. Nokk er til av gassi tey næstu 50 árini heldur hann. Og har er eisini nógv olja, sum kanska er torførari at fáa upp. Feløgini royna so eisini at viðgera kolvetni til havs, og tað kemur so ikki teimum í Hetlandi til góðar í sama mun.

– Eg eri ikki serfrøðingur innan olju. Men nógv av fundunum á okkara síðu verða gjørd beint við føroyska markið, so tað er kanska júst her, at tit fara at finna tykkara olju, og hvør veit, um onkur av hesum keldum ikki gongur tvørtur um markið.

Sandy Clunes sigur seg annars fylgja væl við, hvat hendir í Grønlandi eisini og ivast ikki í, at tað finst olja og gass har eisini.

Hann heldur eisini, at føroyingar eiga so nógv vælútbugvin fólk í sjóvinnu, at hesi eisini kunnu fáa arbeiði í eini framtíðar frálandavinnu, sum kann taka seg upp, tá oljan verður funnin við Føroyar.

*jan@sosialurin.fo*

## 22.000 hetlendingar

**Í dag búgva 22.000 fólk í Hetlandi, tað sama sum fyrr 10 árum síðani. Eitt av endamálunum við at skapa vinnuliga menning í oyggjunum er at økja íbúgvaratalið.**

**Tá oljuvinnan varð uppá tað hægsta búðu 26.000 fólk í Hetlandi.**

*jan@sosialurin.fo*

# Droyma um betri ferðasamband

**SAMBAND. –Tað er okkara vón, at Norrøna aftur fer at leggja leiðina til Lerwick á sumri, og at Atlantic Airways aftur fer at taka Hetland uppí rutu sína um summarið millum Føroyar og London sigur Sandy Cluness, formaður í Hetlendska Oyggjaráðnum.**

Jan Müller

Oljuvinnan hevur skapt nógvar inntøkur til hetlendska samfelagið, sum aftur eru brúktar til at menna aðrar vinnur. Tað var m.a. partur av hesum inntøkum, sum vóru grundarlagið undir íløgum í Smyril Line og sum bráddliga bygdi brýr millum oyggjabólkarnar báðar. Men kuril kom í samstarvið nøkur ár herfyri, men hetta hevur so ikki sett kílar í samvinnuna millum londini. Sandy Cluness skilur væl, at tað var ikki lætt at varðveita føstu rutuna, tí m.a. so fáir hetlendingar gjørdu brúk av henni - og rutan harvið ikki gav nokk til fyritøkuna.

– Vit eiga framvegis ein lítlan lut í felagnum og ynskja tað besta fyri Smyril Line. Vónandi verður tó møguligt hjá Norrønu í framtíðini eisini at leggja at í Hetlandi. Sum er siglir skipið oftani tætt framvið og hevði tað verið gott, um skipið legði at í Lerwick um summarið, tá hetlendingar kundu hugsað sær at farið til Danmarkar ella til Føroya.

Tað var eisini tann tíð, tá Atlantic Airways legði leiðina til Hetlands á rutuni millum Vágar og London. Vónandi verður henda flúgvingin uppafturtikin ein dag sigur Sandy Cluness. Nógva virksemið í Hetlandi komandi árini eitt nú í sambandi við útbyggingar í olju- og gassvinnuni átti eisini at verið gott grundarlag hjá Atlantic Airways at tikið Hetland uppí aftur rutuna millum Føroyar og Bretland.

Hetlendingar hava síðani annan heimsbardaga havt rættiliga tætt samband við Norra.

Tvær ferðir um vikuna um summarið verður flogið millum Norra og Hetland. Hetta ikki minst fyri at nøkta flutningin av arbeiðsfólki, nú norðmenn eiga nógv í hetlendsku alivinnuni. Annars er ferðasambandið bæði sjó- og serstakliga loftvegis millum Hetland og Aberdeen fleiri ferðir um dagin.







*Hetlendski løgmaðurin ynskir Smyril Line góða eydnu og vónar, at Norrøna aftur fer at leggja leiðina til Lerwick um summarið, og at Atlantic Airways fer at fáa Hetland við aftur í rutuskránna á sumri millum Føroyar og London*